gult cyan magenta svart

Umboðini fyri vinnulívið rýma úr Skipanarnevndini

– Tað er burturspilt at brúka tíð uppá hetta, siga tey fýra vinnuligu umboðini, sum nú takka fyri seg

ÁKI BERTHOLDSEN

Skipanarnevndin, sum skal geva landsstýrinum tilmæli í fiskivinnuálum, er nú við at syndrast.

Fyri nøkrum døgum síðani var tað fiskifrøðingurin hjá Fiskirannsóknarstovuni, sum vildi sleppa úr nevndini.

Og nú eru tað umboðini fyri vinnulívið, sum hava gjørt av at rýma.

Báðir partar rýma, tí teir verða ikki tiknir fyri fult.

Teir rýma, tí at teir føla, at landsstýrið ger akkurát, sum tað hóvar tí, sama, hvat limirnir í Skipanarnevndini siga.

Men meðan tað er ivasamt, um fiskifrøðingurin kann fara burturúr, tí hann starvast undir Landsstýrinum, er tað ongin, sum kann noyða umboðini fyri vinnulívið at taka lut í arbeiðnum, tí at vera limur í Skipanarnevndini er ikki tænastuskylda hjá teimum, sum umboða vinnulívið.

Og teir fýra limirnir, sum umboða vinnulívið í Skipanarnevndini, hava nú gjørt

– Longu áðrenn hann hevur sett seg inn í tilmælið frá Skipanarnevndini, hevur landsstýrismaðurin í fiskivinumálum gjørt av at skerja fiskidagatalið komandi ár. Tað hevur sannført vinnuligu umboðini í nevndini um, at tað er nyttuleyst at halda fram

Tilvildarlig mynd

av at fara úr nevndini.

– Tað, sum er hent hesar seinastu dagarnar, hevur sannført okkum um, at tað er nyttuleyst hjá okkum at halda fram í Skipanarnevndini, siga Óli Jacobsen, Jónsvein Knudsen, Árni M. Dam og Auðunn Konráðsson, sum umboða vinnuna í Skipanarnevndini.

Tað, sum teir eru serliga misnøgdir við, er, at landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jørgen Niclasen, hevur boðað frá niðurskurði í fiskidagatalinum næsta í fiskiári, sum byrjar 1. september, longu áðrenn hann hevur sett seg inn í tilmælið frá Skipanarnevndini.

– Longu áðrenn Skipanarnevndin fór undir arbeiðið at gera Landsstýrinum tilmæli um, hvussu nógvir fiskidagar skuldi vera komandi fiskiár, vóru vit í iva um, um tað yvirhøvur loysti seg at fara undir hesa uppgávuna, siga tey fýra umboðini.

Tað, teir sipa til, er, at teir siga, at longu tá ið fiskidagarnir fyri í ár vórðu ásettir, boðaði landsstýrismaðurin frá skerjingum komandi ár, uttan at Skipanarnevndin upp á nakran máta hevði havt høvi til at viðgera tann spurningin.

–Og nú hevur hann aftur í fjølmiðlunum boðað frá skerjingum í fiskidagatalinum komandi ár, og at hann nústani nú fór at seta seg inn í tilmælið hjá Skipanarnevndini.

– Raðfylgjan skuldi verið tann beint øvugta, siga tey fýra vinnulívsumboðini í Skipanarnevndini.

Og hetta hevur nú sannført teir um, at tað er nyttuleyst hjá teimum at halda fram við arbeiðnum nevndini.

Samstundis hevur tað sannført teir um, at spurningurin um at áseta fiskidagatalið, er eitt politiskt mál burturav.

Teir skoyta eisini uppí, at tann tillagingin av fiskiflotanum, sum fiskimálaráðharrin hevur sóknast eftir, er byrjað.

– Men tær fráboðaðu skerjingarnar í dagatalinum fara bara at elva til eina óvissu í vinnuni, sum ger tað ómøguligt hjá vinnuni at leggja ætlanir fyri, hvussu hendan tillagingin skal leggjast til rættis, tí tað ber ikki til at leggja langtíðarætlanir av tí, at fortreytirnar broytast ár frá ári.

Í blaðnum í morgin, sum verður at fáa nógva staðni í kvøld, hava vit eina meiri nágreinliga frágreiðing frá Óla Jacobsen, fiskimannafelagsformanni um, hví tey fýra umboðini fyri vinnuna í Skipanarnevndini hava tikið hesa støðuna.

Hendan frágreiðingin stendur eisini í FF Blaðnum, sum kemur út í kvøld.

Hvat er eftir at samráðast um?

Henda samgongan hevur ferð eftir ferð í meiningarkanningum fingið at vita, at hon hevur ikki fólkið aftanfyri seg í sínum stríði fyri at fáa Føroyar burturúr felagsskapinum við Danmark og Grønland.

Nú vilja tey, sum fáa meiningarkanningar ímóti sær, vanliga heldur ikki góðtaka úrslitið av teimum, men svarið frá veljarunum til nakrar spurningar í hesum seinastu kanningunum hevur verið so greitt, at væl ber til at gera nakrar niðurstøður úr tilfarinum.

Antin er spurningurin um loysing eitt vánaligt mál í sjálvum sær ella hava forsprákarnir fyrireikað seg ov illa hvørja ferð, teir hava verið til samráðingar við Nyrup, tí hvørja ferð eru teir komnir aftur sum av torvheiðum og hvørja ferð hevur Føroya fólk peikað niðureftir itl mannagongdina.

Høgni Hoydal sleppur ofta ov lætt undan naskum og kritiskum spurningum frá føroysku pressuni. Soleiðis slapp hann væl frá uttan mótspurning í Útvarpi Føroya at siga, at danir ikki hava argumentir fyri teirra støðutakan eins og vit, men at vit bert sita yvir fyri ein ráari kolonimakt, sum ikki vil sleppa okkum. Alt okkara verður sópað av borðinum. Sum fornermaðir smádreingir koma hesi okkara umboð aftur úr Danmark og vilja fortelja okkum, at eingin vil taka teir í álvara.

Tíbetur hava onnur lond t.d. Danmark eina meira árvakna og spyrjandi pressu enn vit og tíbetur fáa vit okkurt brævi frá Nyrup um gongdina í málinum og donsku sjónarmiðini. Tá er ikki samsvar við tað, vit fáa at vita frá Høgna Hoydal & Co. Um danska pressan og Nyrup eru á rættari leið, so er Høgni Hoydal á skeivari leið. Hetta kallast manipulering ella villeiðing og tað er naivt út um øll mørk av einum fyrrverandi journalisti at halda, at hetta ber til í einum upplýstum samfelagi í dag – sjálvt uttan pressu.

Eg havi fyrr skrivað eina grein um hetta veilleiðandi virksemi og havi síðani við einum skelki fyri og øðrum eftir fingið eina syrgiliga váttan fyri, hvørja ávirkan hetta hevur havt – kanska serliga á okkara unga fólk. Her eru eingi argumentir, men bert ein persóndyrkan og rakstrarróp, ið minna okkum á óhugnaligar tíðir í okkara søgu. Tað er skelkandi.

Sum ein liberalur føroyingur, ið arbeiðir fyri sjálvbjargni og sjálvræði kennir ein seg illa við at vera umboðaður av eini samgongu, sum fór biddaraferð til Danmarkar á fyrsta samráðingarfundi. Ikki biddarar í kloddabrókum, skrivaðu donsku bløðini, nei, hetta vóru altarklæddir biddarar ella nálastríputir biddarar, sum vildu hava danskar skattgjaldarar at strika skuldina fyri okkara ovurnýtslu at fíggja somu ovurnýtslu í 50-70 ár aftur.

»Færøske kræmmere« – føroyskir kraddarar – skrivaði eitt annað danskt blað aftaná seinastu samráðingarnar. Ein situr hjálparsleysa lotur eftir og hugsar um stríðið, at skula byggja alt hetta uppaftur, sum henda samgongan hevur dittað sær at bróta niður, uttan at hava føroyska fólkið aftanfyri seg.

»Tit kunnu fáa olju sum avdrøg um nøkur ár« var seinasta boði til danir »og akta tit ikki, so fara vit at biðja ST koma upp í leikin«. »Nei«, segði føroya fólk. »Vit veðseta ikki oljuna, um hon er har og Høgni Hoydal hevur totalt misskilt ST-samtyktina. Hetta fara vit at klára sjálvi«.

Og hvat er nú eftir at samráðast um? Føroya fólk og Nyrup tykjast at vera nøkulunda samd og kunnu óivað finna fram til eina loysn um broytingar í okkara ríkisrættarligu viðurskiftum. Men samgongan við okkara anonyma løgmanni á odda tykist at hava lítið at tosa við hesar báðar partarnar um. Hon situr við tali- og initiativrættinum og forðar tí fyri, at Nyrup og føroya fólk sleppa at hitta hvønn annan á máli.

Einasti vegur burtur úr naggatódnini er, at samgongan førkar seg til síðis og gevur øðrum møguleika fyri at koma í staðin ella at løgmaður við at skriv aval út, spyr fólkið, hvat ið tað heldur.

Í blaðgrein um vikuksifti nevnd »the same procedure« ger Høgni Hoydal nógv burturúr at vísa á, at danir bert hava gjørt tað, sum ein kundi rokna við. Teir hava borið seg at sum ein hvør annar vildi gjørt. Tað er í Føroyum, vit hava trupulleikarnar, sigur hann og teir eru, at føroyingar als ikki vilja hava hetta fullveldi, sum hann og aðrir vilja samráðast við Nyrup um.

Greinin endar tí eisini við einum væl kendum niðurlag, men nú tykist røddin uppgevandi og hás, tá ið hon kanska fyri seinastu ferð grælar: »At vísa vilja og halda fast um, at vit vilja taka ta fullu ábyrgdina og hava evsta valdið í Føroyum«. Hetta var slogani hjá fullveldisfólkunum, hetta var herrópið, teir vildu heilavaska okkum við, men av tí at teir flestu føroyingar halda seg hava bæði vilja, ábyrgd og vald í forvegin, fekk sloganið lítla ella onga ávirkan. Rópini vóru tóm og høvdu einki nýtt í sær.

Bert tankin um at henda samgongan skal fara ein túr afturat til Danmarkar at samráðast er óhugnaligur. Hvørji uppskot fara teir nú at finna uppá og hvørji skotsmál skulu vit heimasitandi vænta okkum hesaferð. Soðið gerst tynri og tynri og fleiri og fleiri føroyingar krympa tærnar meira og meira.

Gevist tí við fullveldisætlanini hesaferð. Hetta var ein miseydnað og illa fyrireikað roynd, sum ikki hevði føroya fólk við í ætlanini. Tað var eitt stórt mistak. Nógv – fyri ikki at siga næstan alt annað arbeiði hevur ligið á láni undir fullveldisprocessini. Føroyar hava mist í minsta lagi 2-3 ár í menning, meðan royndin varð gjørd.

Ein søguligur møguleiki fyri at styrkja okkara búskap, reisa okkara niðurslitnu stovnar sum sjúkrahús, skúlar og strandferðslu og at gera nakað munagott á eldraøkinum tykist at vera farin fyri bakka. Søguliga løtan hjá loysingarmonnunum gjørdist vanlukkuløta fyri Føroyar. Vit eru afturútsigld hetta langa strekki í mun til okkara grannar og kappingarneytar. Av sonnum ein dýr roynd.

Sópið nú borðið reint og latið spurningin um tey ríkisrættarligu viðurskiftini liggja til henda atsóknin er gloymd og takið ikki málið uppaftur, fyrrenn tað er eitt væl lýst krav frá føroya fólki. Tástaðni er grundarlagið tað rætta fyri at kunna viðgera spurningin og fyri at kunna vera tikin í álvara sum ein mótpartur í samráðingum. Ein mótpartur við mandati til at samráðast.

Gøtu 04.07.2000
Atli Hansen

gult cyan magenta svart

Fitt av sild g‡tt undir Føroyum

Fyri fyrstu fer› sí›an 1968 kunnu fiskifrø›ingar sta›festa eina væl eydna›a g‡ting á føroyskum øki

DIA MIDJORD

Ta› eru 32 ár li›in sí›an nor›havssildin í t‡›andi nøgd hevur veri› vi› Føroyar og g‡tt. Og yngulkanningar vi› Magnus Heinason sta›festa, at ein stórur partur av sildini hevur yvirliva›.

– Vit eru ikki fullvísir í, at talan er um nor›havssild. Tískil ver›a royndir sendar norskum serfrø›ingum, i› endaliga kunnu sta›festa, at talan er um hesa sildina, sigur Jákup Reinert fiskifrø›ingur.

Hann er sera fegin um, at sildin aftur hevur g‡tt í føroyskum øki, tí hetta kann gera vistskipanina meira stø›uga.

– Sildin er fø›i hjá bæ›i fugli og fiski. Hon etur seg feita á landgrunninum og førir harvi› orku› inn á føroyskt øki›. Hetta kann styrkja vi›breknu vistksipan okkara, sigur Jákup Reinert.

Hóast tunnurnar ikki fara at hópa seg upp á Vestaru Bryggju, so eru útlit til, at nor›havssildin aftur kann gerast partur av framtí›ar fiskivinnuinntøkum

Vei›a um veturin

Ta› er nú einafer› solei›is vi› fiski, at hann altí› kemur aftur á sama sta› at g‡ta, har hann sjálvur er g‡ttur og vaksin upp.

Og er talan um nor›havssild, so kunnu vit um eini f‡ra ár, tá sildin kemur inn í fiskiskapin, aftur fáa gle›i av henni.

– Føroyingar kunnu tá vei›a eftir sild um veturin, tí hon er feit og serstakliga gó› til matna, sigur stjórin á Fiskirannsóknarstovuni Hjalti í Jákupsstovu.

Hann leggur kortini dent á, at yngulkanningar bert eru fyrsta veglei›andi bo› uppá, hvat er í væntu.

Men kanningarnar hjá Fiskirannsóknarstovuni av sildini vi› Føroyar hava veri› so miki› positivar, at vit í Føroyum kanska áttu at repetera› frálíka sangin »Skútur brátt stevna av fir›i út, ta nor›havssild at fanga«.

Eiler Jacobsen er serstakliga fegin um, at sildin aftur hevur g‡tt í føroyskum sjógvi

DIA MIDJORD

Eiler: Frálík tí›indi

Fyrrverandi rokskiparin Eiler Jacobsen er júst heimkomin av sildatúri í norskum sjógvi og fegnast um tí›indini, at sildin aftur hevur g‡tt í føroyskum sjógvi

Er ta› nakar, i› kennir til sildina, so er ta› rei›arin og fyrrverandi rokskiparin Eiler Jacobsen. Hann er júst heimkomin av sildatúri vi› Krúnborg, har hann hesafer› var mynstra›ur sum fer›afólk.

– At sildin aftur g‡tir í føroyskum sjógvi er so avgjørt ein stór hending, sigur Eiler Jacobsen.

Á sildatúrinum í norskum sjógvi hev›i Krúnborg eitt hál upp á eini 700-800 tons. Og hóast nógv ár sum rokskipari, var hetta næststørsta háli› Eiler nakrantí› hevur veri› vi› til at fingi›.

– Nú sildin aftur er komin í føroyskan sjógv, kann hetta gerast vanligt í sildafiskiskapinum vi› Føroyar um várarnar, leggur hann aftrat.

Gamla mynstri›

Eiler Jacobsen roknar vi›, at nú sildin hevur g‡tt í stórum tali vi› Føroyar, er hon í holt vi› at taka gamla fer›amynstri› uppaftur.

– Um solei›is ver›ur, stendur sildin nor›an fyri Føroyar um summari›, sigur hann.

Og ta› kann meira enn so ver›a, at vit aftur fáa gó› sildaár, sum tey mi›skei›is í sekstiárunum. Tá var hann nevniliga mitt í rokanum.

– Vit sigldu vi› 10 míla fer› og ta› tók okkum einar 4 tímar at koma ígjøgnum sildatorvuna, so tú kanst ætla, at nógv var til. Ta› veruliga kóka›i av sild, sigur Eiler Jacobsen.

Børn úr Ukraina búgva í Soli Deo Gloria

11 børn úr Ukraina skulu ver›a í Føroyum í gó›ar tríggjar vikur fyri at fáa heilsubót

STEFAN Í SKORINI

T‡smorgunin komu 11 ukrainsk børn í aldrinum 10-14 ár til Føroyar. Ta› er Skandinaviska Barnamissiónin, sum hevur fingi› fer›ina í lag. Vi› á fer›ini er eisini ein tolkur. Børnini eru øll rakt av kjarnorkuvanlukkuni, sum var í 1986 í Kernobyl, og tí eru tey send til Føroyar. Teirra verjuskipan er ikki serliga gó›, men vi› gó›um kosti og nógvum vitaminum ætla fyrireikararnir at bøta um hetta.

Fyrireikararnir leggja stóran dent á, at børnini fáa okkurt til likam, sál og anda me›an tey eru í Føroyum. Gó›an mat fáa tey hvønn dag, men eisini hoyra tey gle›ibo›skapin, me›an tey eru í Føroyum.

Í gjár vóru børnini til tannlækna, og eisini hava tey veri› og svomi›. 15. juli ver›ur fari› til Havnar, har børnini sleppa at keypa sær eina leiku í BR, og 19. juli gongur lei›in til Selatra›. Gist ver›ur á skótadeplinum í bygdini. Børnini ste›ga her til 28. juli, tá i› lei›in aftur gongur til Eystureuropa.

VIKA 27
1 American Pie
2 Blue Streak
3 The Haunting
4 007 - The World is Not Enough
5 Thomas Crown Affæren
6 Instinct
7 Deep Blue Sea
8 The Ninth Gate
9 Mickey Blue Eyes
10 Fight Club

Í Gundadali tel. 31 47 70
Í Kollafirði tel. 42 10 83
Í Saltangará tel. 44 91 33
Í Klaksvík tel. 45 73 53
Í Sørvági tel. 33 20 01
Í Leirvík tel. 44 33 60
Í Skálafirði tel. 44 12 00

STATOIL
støðirnar kring landið

petur & petur 320870